Øvugt hegnskylda?

HANUS VANG

Á ting er komið eitt uppskot um hegnskyldu, ið brýtur við kanska 1.000 ára hevd á økinum.

Uppskotið er at tey, ið eiga kríatúr skulu hegna hesi burturav vegum og bústøðum.

Verður ognartikið til veg ella útstykkingar, ja so skal tann íð mist hevur eisini gjalda og halda við líka tað tilhoyrandi hegni. Um hetta ikki verður hildið - ja so hevur kríatúreigarin endurgjaldsskyldu!

Verður hetta samtykt so verður helst allur seyður tikin av har vegir og bústaðir eru.

Tað einasta jaliga, ið sigast kann um hetta uppskotið er, at tað setur fokus á stóra trupulleikan, ið ferðslan og nógvir hagar hava av yvirkoyring, mest av seyði. Sjálvsagt er hetta vandamikið fyri fólk og seyð og sera dýrt fyri seyðaeigara, tryggingarfeløg og bileigara.

Tó hevur hetta uppskotið við sær, at óðalsmenn og bøndur eru samdir fyri eina ferðs skyld.

Lagt navn til uppskotið hava Magni, Helgi, Eyðgun, Sjúrður og Torbjørn. Tað sigst, at framtíðarálit sambandsins er pennasjaførur.

Hvat er galdandi nú?

Sum nú er, er kaos á økinum. Og hví er tað tað?

Jú, tað er tí at Landsverk og játtandi myndugleikin – Løgtingið - ikki halda hegnskyldu sína.

»Lov om hegn og markfred«, vanliga nevnd »hegnlógin« er ein partur av sonevndu »gráubók«, ið kom í gildi í 1937 og 38, aftan á næstan tríati ára viðgerðartíð. Hart stóð á gomlum nøglum av hesi lóg, ja so hart, at vit fingu Fólkaflokkin burturúr stríðnum.

Sjálvt um sera fáir bilar og vegir vóru tá, so er lógin á hesum øki framtíðartryggjað, tí í grein 6 stykki 2 sigur Hegnlógin: *»De foranstående regler finder ikke anvendelse på ejendomme, som adskilles ved driftevej for kvæg (geil). I dette tilfælde kan enhver ejer af ejendom, som støder op til vejen eller ligger så nær ved den, at han udsættes for at lide skade ved ved mangel af hegn, kræve hegn mod vejen.*

Hegnspligten påhviler alle disse ejere samt de ejere, som benytter vejen som driftevej«.

Greiðari kundi tað valla sigast í 1937.

Við øðrum orðum so eiga okkara 20.000 bilar og nakrir fáir jarðaeigarar at gjalda og halda øll neyðug vegahegn.

Sum samfelagið er nú er upplagt, at Landsverk hevur hesa uppgávu. Um so útreiðslan fer á bilar og jarðaeigarar ella á sama hátt sum aðrar vegútreiðslur, tað vil siga umvegis landskassainntøkur og Løgtingsjáttan, er ein annar spurningur.

Men sum sagt fyri at loysa trupuleikan er einans neyðugt at Landsverk og Løgting akta galdandi lógarverk.

Hvat kann hetta óskilið kosta seyðaeigara?

Semja er um, at ongin hagi er er so meint raktur av seyðamissi av ferðsluni sum Hoyvík.

Í tríati ár hevur, uttan úrslit, verið togast við LV um hegn framvið Kalbaksvegnum.

Í hesi tráti ár eru umleið 900 seyðir farnir. Tað er ein ótrúliga stór gonga. Stórur missur hjá bónda, ferðslufólki og tryggingum. Vónandi eru ikki deyðsvanlukkur hendar av hesum óskili, men tað er ilt at vita.

Vit eiga at fáa skil á hesum óskili ongantíð ov skjótt.

Men at taka áður nevnda uppskot í álvara er »totalt langt úti«.

So langt úti, at tað mest minnir um »pipar og salt«-skemt.

Vónandi vaknar Løgtingið.

Um at taka sín egna heilivág

EDMUND JOENSEN
Løgtings- og fólkatingsmaður

Eitt ávíst lesarabrævv um vikuskiftið fær ein at undrast á, at eitt menniskja – fyri at svína onnur út – setur seg at viðgera heilakyknurnar hjá øðrum. Hetta er so langt úti, at orð eru ikki fyri tí. Tað man siga rættiliga fitt um brævskrivaran

Tað er ikki hvørt orð, tú skalt svara til, og ikki hvørt gildi, tú skalt fara til.

Gamla orðatakið er hóskandi, eftir at eg havi lisið eitt framúr óseriøst lesarabrævið, sum ein løgtingslimur í Tjóðveldi hevði í bløðunum um vikuskiftið.

Undrunarvert er, at eitt menniskja – fyri at svína onnur út – setur seg at viðgera heilakyknurnar hjá øðrum. Hetta er so langt úti, at eg havi ikki orð fyri tí. Tað man siga rættiliga fitt um brævskrivaran.

Tann mest óseriøsa partin av lesarabrævinum fari eg at lata liggja.

Netverk og samskifti við serfrøðingar

Vamlisliga lesarabrævið finst at undirritaða, tí eg ditti mær at samskifta við skilafólk um politiskar spurningar og harumframt søki mær ráð frá serkønum samskiftisfólkum.

Til hetta er í stuttum at siga, at eg havi altíð havt eitt gott netverk. Tað er samansett av nógvum ymsum fólkum, stovnum, fyritøkum o.ø. bæði í Føroyum og uttanlands. Gott netverk tryggjar, at man sum politikari hoyrir nógv ymisk sjónarmið, og at mál verða vend væl og virðiliga.

Sjálvandi leiti eg mær eisini kunnleika hjá serkønum innan tey ymsu samfelags– og fakøkini. Á tann hátt verða politiskar støðutakanir og avgerðir undirbygdar best møguligt.

Vónandi er hetta galdandi fyri flestu politikarar her heima. Í øllum førum er hetta vanligur politiskur arbeiðsháttur aðrastaðni í heiminum. Fyri meg er heilt avgerandi, at politikarar duga at lurta.

Positivt at samskiftið gerst betur

Sama er galdandi fyri hetta at leita sær serkøna ráðgeving innan samskiftisliga fakøkið. Onki er meira náttúrligt í tíðini, vit liva í, sum er merkt av, at øll eru stórforbrúkarar av samskifti.

Í londunum kring okkum er púra vanligt, at einstaklingar, fyritøkur, áhugafeløg, politikarar og politiskir flokkar leita sær serkøna ráðgeving innan samskifti. Í Føroyum eru tíbetur fleiri – eisini politikarar – ið halda somu leið.

Fleiri munnu hava sannað, at tey, ið forsøma at samskifta væl, kunnu fáa trupult við at sláa ígjøgnum. Aðrastaðni er politiskt samskifti professionaliserað fyri langari tíð síðani, og fyrimunurin er væl saktans, at sum frá líður er møguleiki fyri at hækka støðið á politiska samskiftinum.

Eg hugsi, at hetta er ein positiv og røtt gongd, sjálvt um summi royna at gera hana mistonkiliga.

At taka sín egna heilivág

Eg skal ikki peika eftir øðrum, tí tey samskifta væl úteftir. Tvørturímóti er tað ein dygd, ið m.a. Tjóðveldi kann njóta gott av. Tann flokkurin hevur traditión fyri at gera brúk av journalistum og samskiftisfólki, m.a. í Løgtinginum. Tað er eisini ein royndur lutur, at í nevnda flokki eru ikki færri enn tveir fyrrverandi og alment settir samskiftisráðgevarar og trý fyrrverandi tíðindafólk úr Sjónvarpi Føroya.

Hetta skuldi gjarna tryggjað Tjóðveldinum gott samskifti úteftir, og tað er bara positivt.

Neyðarsligt er tað tó, at summi klára ikki at taka sín egna heilivág.

Nú kundi eg saktans hildið fram eftir tráðnum í lesarabrævinum um vikuskiftið, ið niðrandi umrøður "spunasmiðir", "politiskar kannustoyparar", "chefideologar" og aðrar spennandi figurar. Eg vil kortini ikki fara niður á støðið hjá honum, ið skrivað hevur.

Ikki ráð til tunlar í løtuni

Nevnda lesarabrævv geva eisini eina fatan av, at undirritaði hevur eina ógreiða støðu til tvey ávís politisk mál. Veruleikin er tó ein annar.

Fyrra málið snýr seg um nógv umrødda tunnilin Norður um Fjall.

Vit eru fleiri – seinast bakkað upp av Búskaparráðnum – sum hava ta sjónarmið, at Føroyar í løtuni ikki hava ráð til at gera nakran tunnil Norður um Fjall.

Í longri tíð havi eg fört fram ta sjónarmið, at vit í Føroyum kunnu ikki halda fram við at økja útreiðslurnar og at skarva av inntøkunum, m.a. við at skerja og frysta ríkisveitingina. Búskaparliga er hetta ein vandamikil kós. At kósin eisini kostar vælferð hjá føroyskum borgarum, ger hana ikki minni vandafulla.

Tá land okkara er komið í slættari sjógv búskaparliga, kunnu vit taka spurningin um tunlar upp aftur. Men ikki fyrr enn tá, og bert um tað er skilagott fyri allar Føroyar.

Fólkaatkvøða er demokratiskur ventilur

Aftur og aftur havi eg greitt frá, hví tað er rætt, at Føroyar framhaldandi eru skipaðar í eitt valdømi. Bert fá hava sagt seg ivast í, hvat eg meini og hví.

Bert tvey ár eru liðin, síðani vit fóru yvir til eitt valdømi fyri øll. Skipanin má fáa loyvi at royna seg. Tí eigur formansskapurin í Løgtinginum ikki at koma við uppskoti um broytingar nú.

Fleiri týðandi fyrimunum eru við at skipa Føroyar í eitt valdømi:

- Meira enn 80% av føroyingum búgva í einum samanbundnum øki
- Kvinnuliga umboðanin í Tinginum skal økjast
- Demokratiska undirskotið, har summi ikki kunnu velja allar uppstillaðar flokkar, má burtur
- Valúrslit við órættvísum tingmannatali mugu burtur
- Meira landspolitikkur má inn í myndina
- Gamla valskipanin er leivd frá fortíðini

Hesi argument eru framvegis góð og galdandi, og tað talar fyri, at Føroyar eiga at halda fast við verandi skipan við einum valdømi fyri øll.

Kemur formansskapurin í Løgtinginum – møguliga við stuðuli frá Tjóðveldi – kortini við uppskoti um at fara aftur til eina skipan við fleiri valdømum, so fer undirritaði at skjóta upp fyri Løgtinginum, at vit halda fólkaatkvøðu um valskipanin

Um lokalpolitisku afturhaldskreftirnar ikki kunnu lata verandi valskipan sleppa at royna seg, so má føroyingurin sjálvur sleppa at avgera sína egnu valskipan. Hetta nevnist demokrati.

O, móðurmál! nú brýtur í bæði borð

EYÐUN Á BORG

Vorðið sum vikuskifti: Foreiningin hevur møti, og "einig kommisión" mælir til bábelskan ruðuleika á bókstavaøkinum! Og eg, sum helt, at hasir jassarnir kundu teljast á einari hond!? Ei undur í, at tað var illveður og áarføri, serliga leygardagin um nón!

FOREININGIN: Gestur var komin úr heimlandinum. Hann skuldi royna at fáa chil á óchilið, nú bókabrenningartíðin nærkast.

Lektarin og skálamaðurin, sum upprunaliga fekk øði í grindina, vóru eisini á møtinum. Krage søger mage.

Hoyrdi umboð fyri Foreiningina mæla mergjað orð í Útvarpinum viðvíkjandi útlendsku bókstavunum: "Tað skuldi vera hensyntakan til FN-regi(n)." Eg meini tað!

Sambært Foreiningini man tað ikki gera petti, um fjøld av føroyingum brúkar donsk landanøvn: Polen, Syrien, Australien, Grekenland o.s.fr., men tað er ræðuligt, um okkurt einstakt land verður stavað við K og ikki donskum C!

KOMMISIÓNIN: Vónbrot, snøgt sagt! Tú veitst, hvat tú kanst vænta av danskligu Foreiningini, men eisini kommisiónin!? Hatta tilmælið fer at elva til ruðuleika, og verður eitt stórt bakkast fyri móðurmálið og føroyska rættskriving.

Eru málsligu hugsjónir Jóhan Hendriks sleptar í nýggju lon á Debesartrøð?

NAVNANEVNDIN: Ein tøkk til navnanevndina! Gott, at tað framvegis glógvar í onkrum, at onkur verjir borg.

UPPSKOT UM BROYTING Í STAVRAÐNUM: a-æ, i-y, í-ý.

Ein Skaalemaður (ikki hin, kortini) skeyt upp, at vit seta bókstavirnar við sama ljóði undir liðina hvør á øðrum:

a-æ (fyrra a og seinna æ), i-y (fyrra og seinna), í-ý (fyrra og seinna).

Hatta er helst eitt frálíkt hugskot. Tað kann minna føroyingar, sum so ofta hugsa á útlendskum, á, at a og æ hava somu úttalu, somuleiðis i og y og í og ý.

KURLA (@): Nú eru vit jú so altjóðalig og kunnu tískil ikki gloyma, at ein "bókstavur" eitur kurla. Kurla má eisini sleppa við í stavraðið!? Er telduheimurin annars ikki í ferð við at góðkenna serbókstavir hjá teimum ymsu málunum?

E.S.: Sum skúlamaður og málvinur endurtaki eg: Takið IKKI útlendsku bókstavirnar inn í føroyska stavraðið, men umhugsið uppskotið um a-æ, i-y, í-ý!

Við føroyskari stavkvøðu